# Tað er rætt at fáa toppskattin niður

*Meiri er á síðu 4*

**– Tað er rætt at flyta skattamarkið uppeftir, sum samgongan ætlar og tað ber ikki til at ganga út frá lægsta felagsnevnara, sigur Jan Mortensen í Vinnuhúsinum**

SKATTALÆTTIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað skal ikki loysa seg betri at arbeiða niðursetta tíð, sigur Jan Mortensen íVinnuhúsinum um skattalættan hjá samgonguni*

– Okkara skattaskipan er ikki nóg góð og tað er avgjørt neyðugt at seta marginalskattin niður, soleiðis sum samgongan ætlar.

Tað heldur Jan Mortensen í Vinnuhúsinum.

Hann heldur, at tað er neyðugt fyri at eggja fólki til at taka eitt tørn eyka, tá ið brúk er fyri tí.

– Í løtuni betala sjálvt arbeiðsfólk toppskatt av teimum seinastu krónunum, tey forvinna og tað tekur hugin frá teimum at arbeiða eyka. Tí er tað rætt at broyta tað.

Jan Mortensen sigur, at tá ið skattamarkið verður flutt, verða tað tær hægru inntøkurnar, sum fáa størsta skattalættan.

Kortini heldur hann, tað ber altíð til at tosa um, antin botnfrádrátturin eisini skuldi verðið hækkaður.

– Tí skilir hann avgjørt teir fakfelagsleiðarar, sum fýlast á skattalættan.

– Men tað hjálpir ikki at altíð at ganga út frá lægsta felagsnevnara og hetta er ein skattalætti, sum allar vanligar inntøkur fáa gagn av.

Jan Mortensen sigur tað tað ber ikki til at geva teimum fyrimun, sum ikki arbeiða fulla tíð. Og tey, sum arbeiða fulla tíð, fáa fyrimun av skattalættanum, hóast tey fáa minstuløn. Men tað eru eisini nógv, sum fáa meiri enn minstuløn.

Og eg dugi ikki at síggja, at tað gagnar samfelagnum, um skattaskipanin er so, at tað skal loysa seg betri at arbeiða niðursetta tíð.

Nú eru tað nógva staðni, á fiskavirkjum og aðrastaðni, har tað ikki er arbeiði fulla tíð.

– Ja, men tað er so ein uppgáva hjá virkjunum at tryggja arbeiðsfólkið fulla tíð, sigur Jan Mortensen. – Og veruleikin er, at virki, sum ikki kunnu tryggja fólki fulla tíð, hava trupult við at fáa fólk, leggur hann afturat.

– Og tað er neyðugt, at markið fyri, nær fólk betala toppskatt, liggur væl omanfyri eina vanliga løn.

Hann vónar ikki, at hetta fer at seta fót fyri tankanum um lønarafturhald afturfyri skattalætta. Og hann vónar eisini, at samgongan verður til at tosa við, so at skattalættin kanska kann broytast eitt sindur.

# Hótta við at leggja býráðið í Havn lamið

**Tíggju fakfeløg, sum hava fólk í starvi hjá Tórshavnar Býráð, krevja at fáa fund við Býráðið. Hava tey ikki færtt aftur á miðdegi hósdagin, taka tey sær rætt til at seta tiltøk í verk**



*Jan Chirsitiansen hevur fingið freist til á miðdegi hósdagin at svara fakfeløgunum*

Heili tíggju fakfeløg, sum hava fólk í starvi hjá Tórshavnar Býráð, hótta nú við at seta tiltøk í verk ímóti býráðnum.

Tað eru nýggju reglarnar, sum býráðið hevur sett í verk fyri prívatum ørindum hjá starvsfólkum, sum hava fingið ilt í fakfeløgini.

Býráðið hevur samtykt, at hereftir skulu starvsfólk ikki kunna fara til lækna, ella tannlækna í arbeiðstíðini, uttan at verða drigin í løn.

Samstundis sleppa tey bara at fylgja sínum allarnærmastu til gravar, uttan at verða drigin í løn.

## Brot á sáttmálan

Fakfeløgini siga, at tey viðurkenna rættin hjá kommununi at seta í verk fyriskipanir, sum eru ein náttúrligur partur av leiðslurætti arbeiðsgevarans.

– Vit viðurkenna tí rættin hjá Tórshavnar kommunu innan fyri hesar karmar og innan fyri vanliga rímiligheit at gera regluferð fyri, hvussu privatørindi hjá starvsfólkinum skulu avgreiðast í arbeiðstíðini.

Hinvegin vísa tey á, at í mong ár eru starvsfólkini ikki drigin í løn, tá tey hava verið til jarðarferð, hjá lækna, tannlækna og líknandi ørindi í arbeiðstíðini.

– Hesi viðurskifti eru tískil ein partur av galdandi sáttmálagrundarlagi, bæði millum Tórshavnar kommunu og tað einstaka starvsfólkið og millum kommununa og undirritaðu verkafeløg, sum stilltigandi og útfyllandi partur av sáttmálunum.

– Av hesi orsøk, kann kommunan ikki uttan avtalu við undirritaðu verkafeløg í verandi sáttmálaskeiðum taka burtur rættin hjá starvfólkinum til løn, tá tey mugu til lækna, tannlækna ella líknandi privatørindi í arbeiðstíðini. Feløgini siga, at reglurnar tískil eru sostatt beinleiðis brot á sáttmálan.

Tey siga, at hetta er eitt álvarsmál og tey krevja tí at fáa fund við Býráðið um hesi viðurskifti.

Og hava feløgini ikki fingið fundarboð frá býráðnum í seinasta lagi hósdagin á middegi, tilskilað tey sær rætt til at seta tiltøk í verk.

Og tey 10 feløgini, sum talan er um, eru: Starvsmannafelagið, Føroya Pedagogfelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Føroya Byggifrøðingafelag, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Føroya Verkfrøðingafelag, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Magistarafelag Føroya og Havnar Handverkarafelag.

## Fáa fund

Jan Christiansen, borgarstjóri sigur, at sjálvsagt fáa fakfeløgini fundarboð.

Hann sigur, at høvdu tey vitað, at tað bleiv sovorðið rumbul burturúr hesum, hevði býráðið taklað tað øðrvísi.

Men Jan Christiansen sigur, at talan er um at fáa greiðar mannagongdir fyri teimum privatum ørindum hjá starvsfólki.

Men hann heldur framvegis, at tað er ikki rætt, at skattgjaldarin í Havn skal betala starvsfólkið hjá býráðnum løn, tá ið tey eru í privatum ørindum.

– Eg vóni at vit finna eina loysn, sum báðir partar kunnu góðtaka, men eg havi eina samtykt í fíggjarnevndini, sum eg má halda meg til og fíggjarnevndin hevur samtykt, hvussu reglarnar skulu vera, sigur borgarstjórin í Havn.

# Bilar

Nr. 24 • hósdagur • 5. februar 2004 • 78. árg.

Toyota Corolla Verso:

# Nýggjur sjey persóna Corolla Verso í vár

**Verso eru MPV útgávurnar hjá Toyota. Ein nýggjur Corolla Verso verður frumsýndur á Geneve Motor Show í mars. Bilurin er teknaður á designeknistovuni hjá Toyota í Suðurfraklandi og er serliga ætlaður til evropeiska marknaðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Nýggi Corolla Verso er designaður hjá Toyota í Fraklandi við smartum og nútímans linjum*

Fyrri Corolla Verso var teknaður í Japan, nú fáa vit skjótt ein nýggjan evropeiskt teknaðan Corolla Verso. Talan verður um ein MPV við upp til sjey sitiplássum og sera liðiligari innrætting, har øll fimm baksetrini kunnu leggjast niður, soleiðis at viðførisrúmið verður heilt slætt.

Designið er nýtt og minnir á ongan hátt um forgangaran. Nógv verður gjørt burtur úr kvalitetinum, t.d. er instrumentborðið í nýggjasta móta og gjørt úr gjøgnumførdum kvaliteti.

Toyota hava stórar ætlanir við bilinum, sum serliga er ætlaður til evropeiska marknaðin. Teir rokna við at selja yvir 60.000 Corolla Verso í Evropa í 2004.

Bilurin verður á danska og føroyska marknaðinum í vár.

*Kelda: Toyota Danmark A/S.*



*Instrumentborðið er í nýggjasta móta við gjøgnumførdum kvaliteti*



*Corolla Verso við upp til sjey sitiplássum og sera liðiligari innrætting*

## Toyota næststørstir



Toyota er nú heimsins næststørsti bilaframleiðari, skrivar tíðindastovan Dow Jones News. Við eini framgongd uppá 9,9 prosent eru teir komnir fram um Ford, sum vóru nr. 2. General Motors er framvegis størst

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mazda í Tivoli



Mazda Motor Danmark eru sponsorar fyri nýggja superrutschebanan, Dæmonen, sum verður tikin í brúk, tá Tivoli í Keypmannahavn letur upp 16. apríl. Hetta er fyrstu ferð, at ein danskur undirhaldsgarður verður stuðlaður við so stórari upphædd

*Keld: Motor Magasinet*

## Japanarar framvegis bestir



Týskar kvalitetsrapportir, sum verða fylgdar upp av bilblaðnum Auto Bild, vísa, at japansku bilarnir framvegis eru teir sum hava minst feilir. Á odda liggja fýra japansk bilmerkir í hesi røð: Toyota, Mazda, Nissan og Mitsubishi

*Kelda: Motor Magasinet*